# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 31.10.2019 kl. 17:30
**Málnr.:** 16/01208 Gerðabók
Nevndarlimir: Jógvan Skorheim, Signhild V. Johannesen, Gunvá við Keldu, Tummas J. Lervig, Kristian Eli Zachariasen, Beinta Klakstein, Óli M. Lassen, Atli S. Justinussen, Beinir Johannesen, Herfrí J. Sørensen og Steinbjørn O. Jacobsen
Varalimir:
Ikki møtt:
Onnur: Tummas T. Eliasen, kommunustjóri
Protokollførari: Jensa Anthoniussen, fulltrúi

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 135/19 | 19/00892-35 | Fíggjarætlan 2020, rakstur (uppskot frá nevndum) |
| 136/19 | 19/01038-4 | Byggiloyvi til neyst í Árnafirði - Malltek |
| 137/19 | 19/01092-3 | Umsókn um sundurbýti og umskipan av uttangarðsjørð á Norðoyri - matr.nr. 20 og 21 |
| 138/19 | 19/01105-3 | Matr.nr. 811 - lendi til veg við Fossagøtu |
| 139/19 | 19/01128-1 | Byggisamtykt - uppskot til regulering í økismarki millum D6, A5 og G |
| 140/19 | 19/01134-2 | Umsókn um samanlegging - matr.nr. 607 og 608 í Klaksvík |
| 141/19 | 19/01153-20 | Atkomuvegur til ovasta økið undir Klakki |
| 142/19 | 19/00069-68 | Flyting millum rakstrarstøð; Víðkan av Fjallafípuni – *eykajáttan, seinna viðgerð* |

**135/19**
**19/00892-35 Fíggjarætlan 2020, rakstur (uppskot frá nevndum)**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 29.10.2019 | 116/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2019 | 135/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Á temafundi 9. okt. 2019 varð rakstur kommununnar viðgjørdur í samband við fíggjarætlan 2020. Niðurstøðan á fundinum var, at málið var lagt fyri nevndirnar í oktober umfarinum til at útgreina útreiðslurnar fyri tey einstøku rakstrarstøðini.
Á niðanfyri standandi talvu er ein samanteljing fyri allar greinarnar. Í samband við lønarframskriving eru lønirnar fyri Klaksvíkar kommunu framskrivaðar við 2%. Fyri NBH er framskrivingin 4%.

| | Klaksvíkar kommuna | Fíggjarætlan 2020 | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| DIM-konta | Rakstrarstøð | Roknsk. | F.ætlan I | Lønar-framskriving | F.ætlan I nevndir |
| | 1.000 kr. | 2018 | 2019 | 2020 | 2020 |
| §1 | Kommunal fyrisiting | 21.861 | 21.880 | 329 | 22.767 |
| | | | | | |
| §2 | Almanna- og heilsumál | 73.393 | 75.793 | 2.531 | 81.129 |
| | | | | | |
| §3 | Børn og ung | 41.498 | 42.295 | 806 | 44.368 |
| | | | | | |
| §4 | Útbúgving og gransking | 9.780 | 9.695 | 33 | 10.138 |
| | | | | | |
| §5 | Mentan og frítíð | 16.242 | 12.660 | 134 | 13.317 |
| | | | | | |
| §6 | Teknisk mál | 20.821 | 20.991 | 370 | 21.803 |
| | | | | | |
| §7 | Kommunalt virki | 15.376 | 12.586 | 64 | 14.319 |
| | | | | | |
| | Rakstrarútreiðslur | 198.972 | 195.900 | 4.266 | 207.841 |
| | | | | | |
| | Fíggjarútreiðslur | 9.964 | 7.600 | 0 | 7.600 |
| | | | | | |
| | Rakstrarútreiðslur tilsamans | 208.935 | 203.500 | 4.266 | 215.441 |
| | | | | | |
| | Inntøkur tilsamans | -271.692 | -270.000 | 0 | -288.500 |
| | | | | | |
| | Rakstrarúrslit | -62.757 | -66.500 | 4.266 | -73.059 |
| | | | | | |
| | Íløgur | 75.864 | 66.500 | | 0 |
| | RLÚ | 13.106 | 0 | | -73.059 |

Samlaðu rakstrarútreiðslurnar, áðrenn fíggjarútreiðslur og rentustuðul, eru 207,8 mió.kr. Samanborið við upprunaligu fíggjarætlan 2019 er talan um ein vøkstur á 11,9 mió.kr. Harav 4,3 mió.kr eru lønarframskrivingar, og 6,9 mió.kr. eru meirútreiðslur annars. Í prosentum er talan um ein samlaðan realvøkstur 3,9% og ein lønarvøkstur á 2,2%.

Nevndirnar hava gjøgnumgingið øll rakstrarstøð og gjørt metingar og umraðfestingar á fleiri rakstrarstøðum.

Av tí samlaða útreiðsluvøkstrinum á 11,9 mió.kr. stavar høvuðsparturin frá fylgjandi økjum, umframt lønarvøksturin.

**Eldraøkið**
Tørvurin á eldraøkinum er stórur, og hevur verið talan um munandi fíggjarliga øking, síðan økið varð yvirtikið. Eisini hevur verið talan um munandi lønarhækkingar á økinum, serstakliga hjá sjúkrarøktarfrøðingum. Lønarvøksturin á økinum verður mettur til 2,4 mió.kr. umframt 1,5 mió.kr. til onnur tiltøk, ið eru politiskar raðfestingar. Tí kann roknast við, at tey tyngstu tøkini eru tikin, men tað verða fleiri eldri borgarar, og tí verður uttan iva ein ávísur útreiðsluvøkstur komandi árini.

**Dagstovnapláss**
Tað er stór framgongd í samfelagnum sum heild, og tí hevur kommunan eisini havt ein fólkavøkstur. Hóast hann ikki er í tí hægra endanum, er talan um ein munandi øktan tørv á dagstovnaplássum. Í ár eru komin 50 nýggj dagstovnapláss. Hendan øking førir til meirútreiðslu á umleið 3,75 mió.kr. fyri fíggjarætlanina 2020.

**Komunalt virki**
Innan økið kommunalt virki er broytingin 1,7 mió.kr. Sløk helvtin kemur av, at nevndirnar hava gjørt eina varliga meting av inntøkunum hjá Klaksvíkar Havn, so at tær eru lækkaðar við umleið 900 t.kr. Harumframt eru økingar millum annað gjørdar hjá sløkkiliðnum, endurnýtsluni og IRF, áljóðandi 800 t.kr.

Samanumtikið geva fylgjandi tiltøk tilsamans 6,2 mió.kr.: NBH 1,5 mió.kr., nýggj dagsstovnpláss 3,75 mió.kr. og minni inntøkur havnin 0,9 mió.kr. Hesar 6,2 mió.kr. samanlagt við lønarframskriving á 4,2 mió.kr. geva tilsamans 10,4 mió.kr. av tí samlaða vøkstrinum á 11,9 mió.kr.

Aðrar smærri raðfestingar eru gjørdar á ymsum konti innan flest øll økir, sum svara til 1,5 mió. kr. Harafturat eru eisini sparingar gjørdar, so pláss hevur verið fyri øðrum raðfestingum.

**Lógargrundarlag:**
Kommunulógin

**Tilmæli:**
Mælt verður til, at fíggjarnevndin samtykkir tann av nevndunum samtykta fíggjarkarm 2020 fyri raksturin hjá Klaksvíkar kommunu á tilsamans 208,7 mió.kr., áðrenn fíggjarkostnað og rentustuðul. Íroknað fíggjarkostnað og rentustuðul 215,4 mió.kr.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 17-10-2019.

**Havna- og Vinnunevndin 21. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagf. 17-10-2019.

**Mentanarnevndin 22. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá umsitingini dagf. 17-10-2019.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 22. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 18-10-2019

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 22. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 18-10-2019.

**Tekniska Nevnd 23. oktober 2019**

KLAKSVÍKAR KOMMUNA

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Nevndin tekur undir við tilmælinum dagf. 17-10-2019.

**Fíggjarnevndin 29. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 24-10-2019, og samtyktunum í UBN og hamn 21-10-2019, MeN, B&U og E&B 22-10-2019, og TN 23-10-2019.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2019**
Tilmælið frá FíN 29. okt. 2019 einmælt samtykt.

## 136/19
## 19/01038-4 Byggiloyvi til neyst í Árnafirði - Malltek

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 21.10.2019 | 127/19 |
| 3 Havna- og Vinnunevndin | 21.10.2019 | 50/19 |
| 3 Árnafjarðarnevndin | 25.10.2019 | 12/19 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2019 | 136/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Spf Malltek søkir vegna neystaeigarar í Árnafirði um byggiloyvi til neyst oman á verandi stoyptu neystagrundir.
Økið er útlagt til grønt øki (D24), og í økinum kunnu neyst verða bygt, og kann yvirhædd nýtast til summarhús.




Ásetingarnar fyri D24 í byggisamtyktini siga viðv. bygging, at loyvt er at byggja í tveimum hæddum, men er hæddin av sjálvum neystinum ikki nærri ásett. Víðari stendur: "Sambært góðkendari ætlan fyri alt ella part av økinum". Tað er ongin ætlan góðkend fyri økið.

Umsøktu neyst venda oman og niðan, og verður hægsta punkt 4,85 m omanfyri veghædd. (Vanliga verður loyvt at byggja 5,5 m omanfyri veghædd, har sethús standa niðanfyri veg.)

**Lógargrundarlag:**
Grønt øki D24

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar

**Tilmæli:**
Tekniska fyrisiting mælir til at geva byggiloyvi út frá innsendu tekningum og mælir samstundis til at gera greiðari ásetingar fyri økið (D24), sum niðanfyristandandi.

*Neyst mugu ikki verða bygd í meira enn einari hædd og loft. Loftið kann verða innrættað til frítíðaríbúð við treytum eins og til íbúðir. Frítíðaríbúð kann ikki nýtast til fastan bústað. Hæddin á neystum kann í mesta lagi vera 5 metur til mønu, í mun til vegin frammanfyri neyst. Neyst skulu hava takhall millum 42 og 45 gr og venda oman og niðan.*

Mælt verður til at senda umsóknina út til hoyring hjá grannum.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-10-2019, treytað av, at Árnafjarðarnevndin eisini tekur undir við tí.

**Havna- og Vinnunevndin 21. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við UBN 21-10-2019.

**Árnafjarðarnevndin 25. oktober 2019**
Ein meiriluti, Jógvan Skorheim, Atli S. Justinussen, Mariann Maslyk og Frederik Justinussen, tekur undir við tilmælinum, dagf. 03-10-2019.
Ein minniluti, Olivar J. Olsen, tekur undir við málinum við teirri treyt, at hæddin á neystum kann í mesta lagi verða 4,65 m til mønu í mun til vegin frammanfyri neyst.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2019**
Soljóðandi broytingaruppskot frá Jógvani Skorheim, borgarstjóra «Mælt verður til, at hæddin á neystum verður 4,65 m í mun til veg, og at heildarætlan verður gjørd fyri alt økið, ið verður løgd fyri nevndirnar aftur seinni» var einmælt samtykt.

## 137/19
## 19/01092-3 Umsókn um sundurbýti og umskipan av uttangarðsjørð á Norðoyri - matr.nr. 20 og 21

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 21.10.2019 | 130/19 |
| 2 Norðoyrarnevndin | 24.10.2019 | 8/19 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2019 | 137/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið er í tveimum pørtum:
Eigararnir av matr.nr. 21, Dávur Joensen og Armgarð Mortensen, søkja um loyvi at býta sundur matr.nr. 21 á Norðoyri í tveir partar, soleiðis at Dávur verður eigari av tí ovara partinum og Armgarð av tí niðara .

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Samstundis søkja eigararnir av matr.nr. 20 og Dávur Joensen um marknaumskipan ognanna millum, soleiðis at 2 gyllin uttangarðs, sum hoyra til matr.nr. 20 verða fluttar á matr.nr. 21 (sundurbýtta partin hjá Dáva Joensen)




**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur

**Tilmæli:**
Tekniska Fyrisiting mælir til at viðmæla umsóknini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-10-2019, treytað av, at Norðoyrarnevndin eisini tekur undir við tí.

**Norðoyrarnevndin 24. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-10-2019.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2019**
Tilmælini frá UBN 21. okt. 2019 og Norðoyrarnevndini 24. okt. 2019 einmælt samtykt.

**138/19**
**19/01105-3 Matr.nr. 811 - lendi til veg við Fossagøtu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 21.10.2019 | 131/19 |
| 2 Tekniska Nevnd | 23.10.2019 | 65/19 |
| 3 Fíggjarnevndin | 29.10.2019 | 110/19 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2019 | 138/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Vísandi til býráðsamtykt frá 29-11-2018 í máli 18/00061 (pkt. 2 og 3) fyriliggur nú avtala við eigaran av matr.nr. 811 um umskipan millum ogn hansara og kommununa.

Avtalan ber í sær, at matr.nr. 811 letur til kommununa uml. 64 $m^2$, meðan kommunan letur uml. 90 $m^2$ til matr.nr. 811. Í samband við vegagerðina tekur kommunan sær m.a. av – eftir nærri avtalu við eigaran – at taka part av garðinum á matr.nr. 811 niður.




**Lógargrundarlag:**
Matrikulógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Tekniska Fyrisiting mælir til, at málið verður avgreitt sambært vísta marknaumskipanarskjali, sum eigarin av matr.nr. 811 hevur góðtikið og undirskrivað.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-10-2019.

**Tekniska Nevnd 23. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við UBN 21-10-2019.

**Fíggjarnevndin 29. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við TN 23-10-2019.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2019**
Tilmælið frá FíN 29. okt. 2019 einmælt samtykt.

## 139/19
## 19/01128-1 Byggisamtykt - uppskot til regulering í økismarki millum D6, A5 og G

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 21.10.2019 | 132/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2019 | 139/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Vísandi til notat í málinum 19/00753 um byggiloyvi til bilhús á matr.nr. 253s er neyðugt at regulera økismarkið millum omanfyri nevndu økispartar í byggisamtykini. – Skal bygging av bilhúsi verða møgulig sambært umsóknini, má økismarkið millum D6 og A5 flytast eini 5 metrar norðureftir. Harumframt er fyrisitingin gjørd varug við, at økismarkið millum A5 og G ikki er i samsvar við verandi viðurskifti á staðnum.



Verandi byggisamtyktarlig økismark




Uppskot til broytt byggisamtyktarligt økismark víst við reyðum

**Lógargrundarlag:**

Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir

**Fíggjarligar avleiðingar:**

-

**Tilmæli:**

Tekniska Fyrisiting er samd við umsøkjaranum í, at hóast nógv pláss er sunnanfyri sethúsini, er trupult at staðseta bilhús her orsakað av stóra jarðarmuninum.

Mælt verður tí til, at farið verður undir tilgongdina við broyting av byggisamtyktarmarkunum galdandi fyri økispartarnar D6, A5 og G, sum víst við reyðum á myndini omanfyri.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2019**

Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-10-2019.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2019**

Tilmælið frá UBN 21. okt. 2019 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**140/19**
**19/01134-2 Umsókn um samanlegging - matr.nr. 607 og 608 í Klaksvík**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 21.10.2019 | 134/19 |
| 2 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2019 | 140/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Umhvørvisstovan biður um kommununnar ummæli til samanlegging av matr.nr. 607 og 608




**Lógargrundarlag:**
Matrikullógin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Ongar – kommunan bert tilmælandi partur.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at viðmæla umsóknini.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 15-10-2019.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2019**
Tilmælið frá UBN 21. okt. 2019 einmælt samtykt.

KLAKSVÍKAR KOMMUNA

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

## 141/19
## 19/01153-20 Atkomuvegur til ovasta økið undir Klakki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 2017-2020 | 21.10.2019 | 123/19 |
| 1 Ferðslunevndin | 21.10.2019 | K-8/19 |
| 2 Tekniska Nevnd | 23.10.2019 | 63/19 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2019 | 141/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið um atkomuveg til ovasta økið undir Klakki og undir Hálsi verður lagt fyri TN og Býráðið vísandi til kommunustýrisskipanina §25, 4. petti, sum ásetir, at tá gøtu-, veg- og onnur íleggingararbeiði skulu verða sett í verk, sendir nevndin tilmæli til býráðið hesum viðvíkjandi, jfr. § 11, 2. petti, og skipar fyri, at arbeiðini verða framd samsvarandi teirri av býráðnum samtyktu arbeiðsætlan. Málið verður eisini lagt fyri UBN, sum hevur útstykkingarnar til sethús sum málsøki.

Seinast í 80´unum ognaði Klaksvíkar kommuna sær lendi til ein útstykkingarveg og sethúsaøki omanfyri ovastu sethúsini undir Hálsi, og skitsuprojekt er gjørt yvir eina ætlan, sum fer frá heimastu sethúsunum undir Hálsi heilt út til uttastu sethúsini undir Klakki. Kommunan hevur síðani tikið atlit til og keypt lendi til atkomuvegir. Ein atkomuvegur er brekkan, sum er niðan til sethúsini hjá Finngerð og Jóannes E. Joensen undir Hálsi 51, og ein annar er uttast undir Klakki, sum víst á niðan fyri standi mynd.

Uttari atkomuvegur undir Klakki – Nýtt grundstykki víst við bláum liti:




Í samband við møguligt sethúsagrundøki undir Klakki (Heini Waag - mál nr. 19/00499) er málið um atkomuvegin tikið uppaftur, og hevur Tekniska Fyrisiting heitt á HMP-Consult um at gera eitt projektútkast, sum vísir, hvussu ein atkomuvegur kemur at liggja í lendinum. Upplýst verður í hesum sambandi, at hæddarmunurin millum vegin og landnyrðingshornið verður 5 metrar, men verður vegurin førdur niðan um stykkið, gerst atkoman betri.

Heimari atkomuvegur við sethúsini undir Hálsi 51:




**Lógargrundarlag:**
Ongin viðmerking.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Í hesum málinum er bert vegalinjan til viðgerðar/støðutakan, og tí verður ikki mett um fíggjarligar avleiðingar.

**Tilmæli:**
Tekniska Fyrisiting mælir viðkomandi nevndum og býráði til at taka undir við linjuføring og longdarskurði av vegi, sum í tekningum frá HMP-Consult dagf. 11-10-2019, og at bygging á møguliga nýggja grundstykkið verður samskipað við projekteraða vegin.

**Ferðslunevndin 21. oktober 2019**
Málið verið til kunningar.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 21. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 16-10-2019.

**Tekniska Nevnd 23. oktober 2019**
Nevndin tekur undir við UBN 21-10-2019.

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2019**
Tilmælið frá TN 23. okt. 2019 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

## 142/19
## 19/00069-68 Flyting millum rakstrarstøð; Víðkan av Fjallafípuni - eykajáttan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 17.09.2019 | 44/19 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.09.2019 | 99/19 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 26.09.2019 | 121/19 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 31.10.2019 | 142/19 |

**Frágreiðing um málið:**
Málið varð fyrru ferð viðgjørt av býráðnum tann 26. september 2019.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 17. september 2019**
Ein meiriluti í nevndini, Beinta Klakstein, Signhild V. Joensen og Tummas J. Lervig, tekur undir við tilmælinum.
Ein minniluti í nevndini, Gunvá við Keldu og Herfrí Sørensen, tekur undir við tilmælinum, men at tilmælta eykajáttanin á 200.000 kr. ístaðin verður flutt millum kontur frá barnaansing felags.

**Fíggjarnevndin 24. september 2019**
Ein meiriluti, JS, SVJ og TJL, tekur undir við meirilutanum í B&U 17-09-2019.
Ein minniluti, GvK og HJS, tekur undir við minnilutanum í B&U 17-09-2019.

**Klaksvíkar Býráð 26. september 2019**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið í FíN 24-09-2019; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJL, KEZ, KáG og BK) og 5 atkvøðum í móti (GvK, ASJ, BJ, HJS og SOJ).

**Klaksvíkar Býráð 31. oktober 2019**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá BýR 26. sept. 2019; tað varð samtykt við 6 atkvøðum fyri (JS, SVJ, TJL, KEZ, ÓML og BK) og 5 atkvøðum ímóti (GvK, ASJ, BJ, HJS og SOJ).

*Fundurin lokin kl. 18.30*